## Ríkir danir drekka ov illa

Danmarks Radio hevur kagað í tøl hjá Region Hovedstaden, og har siga tølini, at fólk, sum forvinna meira enn 525.000 krónur um árið, drekka verri enn onnur fólk. Einasti bólkur, sum kann standa mát við tey ríku, eru tey, sum forvinna minst av pengum. DR skrivar, at støðan við rúsdrekkabrúkinum er hættislig í sokallaða whiky-beltinum á Sælandi. Í Hørsholm hava 41 prosent av monnunum og 31 prosent av kvinnunum alt ov stórt alkoholmisbrúk. Støðan er næstan líka ring í Getofte og Rudersdal.



## Blaðsølan veksur

Beint ímóti tí, sum tey flestu høvdu roknað við, er sølan av avvísum kring heimin vaksin munandi seinastu fimm árini. Serliga í Fjarðeystri og í Miðamerika er blaðsølan hækkað munandi. Ein frágreiðing frá World Association of Newspapers vísir, at hvønn dag keypir meira enn ein hálv milliard fólk eina avís. Og seinastu fimm árini hevur vøksturin í alheims blaðsøluni verið heili 9 prosent.




*Líka yvir tveir tímar sótu børn kring landið við sviðusoð og bíðaðu eftir væl umtókta jólakalendaranum, Jól í Svingi. Líka vistu tey, at Jól í Svingi vórðu stegðaði »í svinginum«*

# Politiið steðgaði Jólunum í Svinginum

**Sunnumorgunin sótu ivaleyst nógv børn og bíðaðu mest sum til fánýtis eftir sjey pørtum av Jól í Svingi, ið verða endursendir hvønn sunnumorgun. Orsøkin var at løgreglan stegðaði sendingini »í svinginum«**

SJÓNVARP
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Sunnumorgunin mundi skilið verða ringt í fleiri heimum í Føroyum. Spent smábørn høvdu leitað sær upp at hyggja eftir Jól í Svingi, sum Kringvarp Føroya hevur føroyskað úr norskum, men til fánýtis.

Í skránni fyri sjónvarpið hjá Kringvarp Føroya stendur, at allir partarnir av jólakalendaranum Jól í Svingi frá undanfarna sunnudegi og fram verða endursendir frá klokkan 08.00. Men soleiðs varð ikki nú sunnumorgunin.

Tá klokkan var farin av átta, var enn eingin jólakalendari á sjónvarpsskýggjanum. Klokkan níggju sama skilið. Klokkan tíggju varð støðan enn óbroytt, og ikki fyrr enn stutt eftir klokkan tíggju komu byrjaði sjónvarpið at senda. Børnini vórðu ikki snýtt fyri alt, og fingu hóast alt tveir teir seinastu partarnar av Jól í Svingi.

### Ikki fyrstu ferð

Talan er tó ikki um einstaka hending, ið varð nú sunnudagin. Hyggjarar hava greitt okkum frá, at seinasta sunnudag vóru eisini seinkingar í sendingunum, tó ikki í sama umfangi sum hesa ferð. Tó kann staðfestast, at Kringvarp Føroya ikki sendir sambært skránni, ið verður prenta í bløðunum og stendur skrivað á heimasíðuni hjá Kringvarpinum.

### Hendiligt óhapp

Programmleiðarin hjá Kringvarp Føroya, Herluf Sørensen, váttar at hann varð gjørdur varugur við trupulleikan hesa ferð, og greiðir frá, at orsøkin er eitt hendiligt óhapp.

- Orsøkin er at maðurin, sum skuldi senda, varð steðgaður av ferðslupolitinum og afturhildin yvir ein tíma. Vit royndu at fáa onkran annan at senda skjótast gjørligt, men tað eydnaðist so ikki fyrr enn klokkan 10. Tað var sera óheppið, men tað er eitt hendiligt óhapp, og vit royndu sum frægast at bøta um tað, greiðir Herluf Sørensen, programmleiðari í Kringvarp Føroya.

Hendingina sunnudagin áðrenn visti hann einki um, og kundi tískil ikki greiða frá, hvat orsøkin til seinkingina ta ferðina varð.

Staðfestast kann tó at hesa ferð vórðu Jól í Svingi steðgaði í svinginum.

# Bilradio punkteraði

**Tað var ikki bert í Kringvarp Føroya, at hendilig óhapp vóru orsøk til at hyggjarar ella lurtarar vórðu snýttir fyri endursendingar. Bilradio á Rás2, ið vanliga verður endursent leygardagar, kom heldur ongantíð í luftina**

ÚTVARP
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hvønn hósdag klokkan 16.05 er Bilradio at hoyra á Rás2. Sendingin er væl umtókt millum lurtarar, og nógv fólk nýta høvið at hoyra ella endurhoyra sendingina tá hon verður endursend á Rás2 leygardagar.

Vanliga verður sendingin endursend klokkan 13 leygardagar, men vegna Tunnilsradio varð sendingin hesa ferð flutt til klokkan 11. Tað varð í øllum førum lýst við.

Tá klokkan gjørdist 11 nú leygardagin mundu fleiri klóra sær í nakkanum tá bert tónleikur var at hoyra og einki Bilradio. Heldur ikki klokkan 13, tá sendingin vanliga verður endursend, kom Bilradio á skránna.

### Hendiligt óhapp

Jonhard Hammer, stjóri á Rás2, hevði onga viðmerking til hvør orsøkin er, at sendingin ikki varð send, men sum skilst er tann feilur hendur, at tøkningarnir á Rás2 hava verið í teirri góðu trúgv um hvønn annan, at onkur av hinum mundi hava lagt hana inn í skipanina. Soleiðs var tó ikki, og sendingin kom ongantíð inn í skipanina, og tískil heldur ikki í luftina.

Sostatt kann bara staðfestast at hendiligt óhapp eisini var orsøk til at lurtarar hjá Rás2 vórðu snýttir fyri eina endursending, og at Bilradio punkteraði á vegnum.

